## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# - Nei, hetta klári eg sjálv!

**81 ára gamla Jona Henriksen smæddist ikki burtur millum hini, tá fínteljingin av fólkatingsvalinum fór fram týsdagin**

VALÚRSLIT
*Snorri Brend*

Týsdagin var dagurin, tá atkvøðurnar frá fólkatingsvalinum skuldu fínteljast. Hetta varð gjørt á Hotel Hafnia.

Millum tey, sum taldu upp var ein kend havnarmynd, fyrrverandi KFUK-skrivarin, hin 81 ára gamla, Jona Henriksen. Hóast komin væl upp í árini bilaði henni ikki hugur at halda á, til seinasta atkvøðan var fíntald seint um kvøldið.

Úrslitið av fínteljingini sæst aðrastaðni í blaðnum í dag.

Formaðurin í valnevndini, Olaf á Stongunum var eina ferð hjá henni og spurdi, um hann skuldi hjálpa henni við teljingini.

– Nei, tað er ikki neyðugt. Hetta klári eg sjálv, segði hon, meðan hon dúgliga taldi og hugdi eftir teimum túsundtals atkvøðuseðlunum.

Eitt satt konubrot, má sigast!



*Jona Henriksen stríddist til »síðstu kvinnu«, tá atkvøðurnar frá fólkatingsvalinum skuldu fínteljast*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Havnar leksikon:

# »Skrædder« var skræddari í Havn í 35 ár

Laurits Chr. Sofus Reinert, vanliga nevndur »Skrædder«, varð føddur í Hoyvík í 1903 og vaks upp í Norðradali.

Frá 1921 til 1956 virkaði hann sum skræddari í Havn. Tey fyrstu árini helt hann til í Vágsbotni og í Grím Kambansgøtu.

Í 1931 flytur hann undir Glasheygg (húsini við pílin). Húsini stóðu niðan fyri har sum vaskaríið í Króki var. Tá hesi húsini vóru tikin niður, flutti »Skrædder« í 1942 til Skipara Hansensgøtu (húsini á vinstru megin á myndini). Har virkaði hann, til hann doyði í 1956.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647 / 273168.

**Næstu ferð hava vit mynd av fyrsta føroyska príslistanum, tann hjá Conrad Juhlert, sum hevði handilin »Thorshavns Pianomagasin & Musikforretning«**







**85 ár**

Mánadagin 21. februar fyllir Andrea Magnussen, Søldarfjørður, 85 ár. Hon verður burturstødd.

**Dagurin**

**17. februar. Finandus,** deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi.

Lesið Sosialin -so eru tit við!